# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Makrelurin – svartkjafturin umaftur!

Vit minnast øll tíðina, tá svartkjafturin kom at standa ovast á breddanum í føroysku miðlunum og annars í tí samfelagsliga kjakinum. Og hvussu hann skjótt gjørdist ein týðandi inntøkukelda. Eftir at hava troytt vanligu fiskastovnarnar heima sum á mið- og fjarleiðum kom svartkjafturin bráddliga inn í myndina sum ein frelsandi eingil. Hetta fiskaslag, sum vit fyrr kendu sum sildaforskrekkjarin og sum nakað, ið vit als ikki kundu brúka til nakað vinnuligt, bleiv eitt alternativ, sum skuldi vísa seg at fáa alstóran týdning fyri føroyska vinnu.

Vit høvdu hoyrt um hann, vit høvdu sæð hann, men høvdu ikki givið okkum fær um, at hann ein dag skuldi gerast týðandi partur av okkara vinnuliga grundarlagi. Tá tað vísti seg, at hesin lítli fiskurin ferðaðist gjøgnum føroyskan sjógv og her fekk sína dagligu føði, fingu politikarar og vinnulívsfólk eyguni upp fyri einum nýggjum tilfeingi.

Og tað skuldi vísa seg, at svartkjafturin gjørdist ein týðandi rávøra hjá eitt nú Havsbrún. Royndir vórðu eisini gjørdar at viðgera fiskin til matna. Tað skuldi tó vísa seg at vera ein torfør gongd, ið kravdi tol. Men so var tað býtisfiskurin. So nógv varð til av svartkjafti, at hann var ein góð vøra at brúka sum býtisfisk. Vit fingu á henda hátt dýrar toskakvotur í norskum og russiskum sjógvi, í umbýti við okkara svartkjaft, nakað, sum hevur havt alstóran týdning fyri okkara búskap fram til dagin í dag. Í dag er flotin so eisini farin at brúka svartkjaftin í síni matvøruframleiðslu.

Nú er bráddliga ein nýggj ”svartkjaftatíð” í eygsjón. Makrelurin, sum vit hava havt avmarkaða atgongd til, vísir seg nú vera fiskaslag, sum finst í ómetaliga stórum nøgdum og sum eins og svartkjafturin etur seg mettan í føroyskum sjógvi. Fiskimálaráðharrin segði við útvarpið nú um dagarnar, at vit eru farnir undir at kanna, hvat er við at henda við makrelinum og í hvønn mun vit eiga at gera okkum tilreiðar til at krevja eina nógv størri kvotu. Í dag eiga vit bert 5% ella 30.000 tons av samlaðu makrelkvotuni. Um somu tíð hoyra vit íslendingar siga, at teir ætla sær av fiska eini 200.000 tons av makreli.

Hetta mál hevur stóran skund. Drála vit so kann henda, at vit missa stór virði, ið vit hava rætt til, av hondum. Okkara embætisfólk og politikarar mugu til at arbeiða skjótt og miðvíst. Um makrelurin eins og svartkjafturin brúkar føroyskt havøki til beiti, so mugu vit gera vart við okkara rættindi.

Um nakar longu hevur sovið í tímanum duga vit ikki at siga, men vinna, politikarar og embætisfólk mugu alt fyri eitt til at raðfesta komandi makrelfiskiskap í føroyskum sjógvi nógv hægri og skjótast tryggja sær, at Føroyar fáa eina munandi størri makrelkvotu, tá henda skal ásetast aftur. Lat okkum læra av svartkjaftasøguni.

**Sosialurin**

## Ótespiligur journalistikkur í Sosialinum um sosialpolitisk álvarsmál



**HANS PAULI STRØM**
løgtingsmaður

Forsíðan í vikuskiftis Sosialinum og opnan inni í blaðnum kann ikki standa uttan nakra reaktión frá politiskari síðu. Ætli mær tí eisini at taka hesar trupulleikar upp í løgtinginum, fyri at vita um vit kunnu rætta upp á nakrar av hesum sosialpolitisku skeivleikunum, men eisini at seta spurningar til avvarðandi landsstýrisfólk, um at greiða frá, hví hesar broytingar eru gjørdar, hvørjar avleiðingarnar eru fyri gomul og sjúk, og hvat skal til fyri at rætta óætlaðar avleiðingar, so steinur ikki verður lagdur oman á byrðu hjá veikastu bólkunum í samfelagnum.

Men samstundis haldi eg Sosialurin ber málið fram á ein sera ódámligan hátt. ”Vísið náði” - ”Vælferðarføroyar eru í fillum” boðar Sosialurin frá. Tá journalistar taka so dýran til, og tá blaðstjórin loypir aftaná og borðreiðir boðskapin upp á ein so kensluliga ágangandi máta, so mugu vit krevja, at tað liggur eitt handfast journalistiskt arbeiði aftanfyri. Tað ger tað ikki í hesum føri hjá Sosialinum. Tað tori eg at siga, tí eg kenni eitt sindur til heilsuøkið.

Lat meg vísa á sum dømi, at inni í blaðnum standa 6 kassar sum dokumentatión hjá hesum trimum journalistunum á Sosialinum. Um tit nú ómaka tykkum at lesa teir tríggjar kassarnar, um ”Dement og hjartasjúklingar”, um ”Sjúklingar annars” og um ”Diabetikarar”, so er innihaldið í øllum hesum trimum kassunum nøkulunda tað sama og byggir á somu broytingar viðvíkjandi heilivági, har egingjaldið hjá pensjonistum er hækkað og stuðulin til ávísan ikki-stuðulsgóðkendan heilivág og kostískoyti er tikið burtur. Rætt er, at hetta hevur elvt til stórar trupulleikar í fleiri førum.

Men tað er ein journalistisk villleiðing, tá tað í einum kassa verður sagt, at hjartasjúklingar ikki longur fáa stuðul frá landinum til teirra heilivág, og tí er teirra heilivágur farin úr 200 uppí 3000 kr um ársfjórðingin. Eg eri sjálvur hjartasjúklingur. Eg havi í fleiri ár fingið Coversyl, ein sera dýrur heilivágur, sum kostaði 541,53 kr fyri pakning við 90 tablettum. Nú er tað broytt soleiðis, at stuðulin til Coversyl er tikin burtur, og í staðin fyri gevur kommunulæknin mær nú resept upp á samsvarandi hjartaheilivág, sum eitur Corodil. Hann kostar 21,20 kr fyri pakning við 100 tablettum. Mín partur er altso nú 10,60 kr, meðan eg fyrr skuldi gjalda 15-20 ferðir so nógv. Hetta er tí ein gagnlig broyting, sum apoteksverkið hevur framt.

Tað er møguligt, at onkrir kommunulæknar ikki hava kunnað síni viðskiftafólk um hetta, og tað eigur man so at syrgja fyri beinanvegin. Eg veit eisini, at tað eru bæði læknar og onnur, sum seta spurnartekin við, um Coversyl í øllum førum kann umbýtast við Corodil. Men hetta umbýti verður gjørt eftir tilmæli frá yvirskipaða heilsuvágsmyndugleikanum Dansk Lægemiddelstyrelse, og hetta umbýtið er tí sett í verk í Danmark, og tað hava so føroysku heilsumyndugleikarnir eisini hildið var rætt at gera.

Her áttu journalistarnir at sett seg í samband við t. d. Landsapotekaran, og spurt hann, hví hetta umbýti við hjartaheilivágínum verður gjørt.

Hinvegin er tað rætt, sum skrivað verður, at tað er komið ógviliga skeivt fyri, at stuðulin til ávísan heilivág til demenssjúklingar er tikin burtur. Og tað má man so syrgja fyri at rætta uppaftur.

Eitt annað dømið um journalistisku ópálítiligheitina hjá hesum trimum journalistum á Sosialinum er tá tey siga, at stuðulin til fótarøkt fyri diabetikarar er skorin burtur, so sjúklingurin nú skal gjalda allan kostnaðin sjálvur. Hetta passar ikki! Mær vitandi arbeiðir Almannamálaráðið við einum uppskoti, sum nú er til hoyringar, at stuðul sum hesin, ið er stuðul við viðgerð, ikki eigur at liggja sum ein stuðul hjá almannaverkinum, men skal vera ein partur av viðgerðartilboðunum innan heilsuverkið. Men hetta er altso enn bert eitt uppskot, sum ikki eingong hevur verið til politiska viðgerð, og tíansheldur enn lagt fram – og tí sjálvsagt ikki veruleiki.

Samanumtikið eru hetta álvarsligir trupulleikar, sum ljóskastarin verður settur á í Sosialinum. Og tað taki eg eisini sum eina skyldu sum ábyrgdarhavandi politikari at taka í størsta álvara, og eisini taka neyðug stig til at rætta tey sosialpolitisku mistøk, sum hetta í fleiri førum snýr seg um.

Men tá journalistar taka so dýran til í síni skriving, so mugu vit krevja – bæði almenningur og politikkarar - at tey ikki einans bera søgur fram, sum tey hoyra frá fólki, men eisini gera sítt arbeiði við neyðugu fakligu professionalismuni. Og tað haldi ikki man kann siga um Sosialin í hesum føri.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.